# TB mátti stríðast fyri sigrinum

**Oddaliðið í flogbóltskappingini hjá kvinnum var í trupulleikum í dystinum ímóti Drátti, og tað mátti ein javnbrótari til fyri at avgera tætta dystin**

FLOGBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tveir dystir vóru í meistaradeildini hjá kvinnum um vikuskiftið, og tað eydnaðist teimum báðum fremstu liðunum at vinna hesar dystir.

Ein dystur skuldi eisini vera millum ÍF og SÍ, men dysturin varð útsettur til mikukvøldið. Orsøkin var, at flogbóltslandsliðið var uttanlands, og tá ið dysturin hjá monnum millum somu feløg varð fluttur, varð eisini gjørt av, at kvinnurnar skuldu spæla mikukvøldið. TB og Mjølnir, sum eru á odda í meistaradeildini hjá kvinnum, spældu um vikuskiftið, og bæði liðini vunnu sínar dystir.

Mjølnir var á vitjan hjá KÍF, og dysturin endaði við einum tryggum sigri til kvinnurnar úr Klaksvík. Úrslitið var 3-0 til Mjølnir, og eisini í settunum var munur millum tey bæði liðini. Fyrsta settið endaði 25-15 til Mjølnir, síðani endaði næsta settið nakað javnari, 25-21, áðrenn triðja setti endaði 25-13 til Mjølnir.




*Oddaliðið Mjølnir vann tryggan sigur á KÍF í bestu kvinnudeildini í flogbólti um vikuskiftið.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### TB mátti stríðast

TB, sum av álvara blandaði seg upp í toppstríðið aftur, tá ið liðið herfyri vann toppdystin ímóti Mjølnir, var í trupulleikum um vikuskiftið.

Frammanundan var greitt, at dysturin á útivølli ímóti Drátti fór at vera trupul, og soleiðis gjørdist tað eisini. Talan var um ein sera spennandi og javnan dyst, og tað skuldi ein javnur javnbrótari til fyri at finna vinnaran.

Fyrsta settið endaði við 25-15 til Drátt, men hóast hendan smeitin fótaði TB sær og vann næsta settið 25-21. Triðja settið endaði við 26-24 til Drátt, og so hevði TB knívin á barkanum. Í fjórða setti vóru tað tær av Tvøroyri, sum akkurát høvdu munin og vunnu 25-23.

Javnbrótarin gjørdist eisini spennandi, men tað endaði við, at TB hevði munin og vann 15-11.

Harvið vann oddaliðið av Tvøroyri dystin 3-2 og heldur fram undir liðini á Mjølni í toppinum í meistardeildini.

# Taptu allar tríggjar dystirnar

**Føroyska manslandsliðið, sum um vikuskiftið var í Skotlandi, tapti allar tríggjar dystirnar móti skotsku vertunum á ferðini**

FLOGBÓLTSLANDSLIÐIÐ
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Føroyska manslandsliðið var um vikuskiftið í Skotlandi, har teir leiktu tríggjar venjingardystir móti skotsku vertunum. Tvær teir seinastu ferðirnar, at føroysku menninir hava leikt móti skotum, hevur tað eydnast okkara monnum at vinna, men soleiðis var ikki hesaferð.

### Bert spenningur í seinasta dystinum

Fyrsti dysturin á ferðini var leiktur fríggjadagin, og hann endaði við einum greiðum sigri til skotska liðið. Úrslitið var 3-0 til skotar, og settúrslitini vóru 25-20, 25-16 og 25-22. Altso ein rættuliga greiður sigur.

Føroyska liðið var ikki fullmannað til fyrsta dystin á ferðini, tí tveir av útisetunum, Steinar Eirikstoft og Johan Nielsen, ið báðir spæla í Danmark, komu ikki til Skotlands fyrr enn til næsta dystin.

Heldur ikki í næsta dystinum gekk nakað serligt hjá føroyska liðnum. Enn einaferð gjørdist úrslitið ein greiður 3-0 sigur til Skotland, og tað er neyvan nakað, ið føroysku leikararnir eru nøgdir við. Sum skilst koyrdi spælið hjá føroyska liðnum tó eitt sindur betur í næsta dystinum, enn tað hevði gjørt í fyrstu royndini á ferðini, og tað gjørdi, at vónirnar vóru eitt sindur betur undan seinasta dystinum á ferðini, sum bleiv leiktur sunnudagin. Settúrslitini í næsta dystinum vóru 25-23, 25-17 og 25-21.

Tann seinasti dysturin gjørdist eisini nógv tann mest spennandi dysturin av teimum trimum á ferðini, og neyðugt var at spæla fimm sett, áðrenn ein vinnari var funnin. Aftur hesaferð vóru tað skotar, sum vóru við yvirlutan, men munurin var lítil. Skotland vann dystin 3-2, eftir at føroyingar annars høvdu verið á odda 2-1 í settum. Settúrslitini hesaferð vóru 23-25, 25-21, 24-26, 25-23 og 15-7 - altso ein sera spennandi og tættur dystur við undantaki av seinasta og avgerandi settinum, har skotar høvdu greiðan yvirluta.

Harvið vunnu skotar allar tríggjar dystirnar móti Føroyum í Glasgow, og hóast hvørki Rúni Weihe og Suni Juul Petersen vóru við føroyska liðnum á Skotlandsferðini hesaferð, so man lítið verða at ivast í, at føroysku leikararnir og venjarin neyvan eru nøgdir við úrslitini móti skotum. Føroyska ferðalagið kom aftur til Føroya mánadagin.

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 10 | 9 | - | 1 | 28 | 7 | 21 | 18 |
| 2 TB | 10 | 9 | - | 1 | 27 | 10 | 17 | 18 |
| 3 Dráttur | 10 | 4 | - | 6 | 21 | 20 | 1 | 8 |
| 4 KÍF | 10 | 4 | - | 6 | 13 | 21 | -8 | 8 |
| 5 ÍF | 9 | 3 | - | 6 | 11 | 18 | -7 | 6 |
| 6 SÍ | 9 | 0 | - | 9 | 3 | 27 | -24 | 0 |

**Meistaradeild, menn**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 7 | 6 | - | 1 | 19 | 7 | 12 | 12 |
| 2 Mjølnir | 8 | 6 | - | 2 | 20 | 10 | 10 | 12 |
| 3 Fleyr | 8 | 5 | - | 3 | 18 | 12 | 6 | 10 |
| 4 ÍF | 7 | 1 | - | 6 | 1 | 19 | -18 | 2 |
| 5 Fram | 8 | 1 | - | 7 | 7 | 22 | -15 | 2 |